

www.oljan.fo

**Jan Müller** 08 - 05 - 2012

# Statoil rimmar úrslit fyrsta ársfjórðing

Norska oljufelagið Statoil hevur lagt fram úrslitið fyri fyrsta ársfjórðing í ár og eru tølini nógv meira lovandi, enn roknað varð við frammundan. Framleiðslan er økt, og tølini á flestu økjum eru batnað. Oljurisin hevði eitt rakstrarúrslit uppá 59,2 mia. kr. áðrenn skatt. Hetta er tað hægsta hjá felagnum nakrantíð fyri ein ársfjórðing og meira enn 10 mia. kr. enn somu tíð í fjør. Analytikarar høvdu annars roknað við einum rakstrarúrsliti uppá 53,6 mia. kr. Sama tíðarskeið hækkaðu rakstrarinntøkurnar úr 151,6 mia. til 196,4 mia. Statoil økti um frameiðsluna við 11% umframt at prísirnir á bæði olju og gassi vuksu nógv. Helge Lund, forstjóri í Statoil sigur, at framleiðslan var sum ætlað og prognosurnar fyri 2012 fara at halda. Statoil hevur rættiliga havt eydnuna við sær fyrstu mánaðirnar av 2012. Boraðir vórðu 12 leitibrunnar. 8 vóru fund og merkir tað eitt fundprosent uppá 67. Statoil framleiddi 2.193 milliónir tunnur av olju/gassi um dagin hetta tíðarskeiðið. Vit hildu fram við at taka nýggjar oljukeldur í brúk, og vit øktu um framleiðsluna frá verandi keldum. Hetta gav eina methøga framleiðslu frá okkara altjóða virksemi. ?Á norskum øki øktu vit gassframleiðsluna í samsvar við okkara strategi at fáa sum mest burtur úr gasskeldunum. Vit høvdu eisini eina støðuga oljuframleiðslu, sum er eitt úrslit av væleydnaða arbeiði okkara at økja um framleiðsljuna sigur Helge Lund við norskar miðlar. Tá talan er um framtíðar útlitini fer Statoil framhaldandi at menna teir leitipartar, sum felagið hevur í loyvum. Felagið fer at bora nýggjar brunnar í árinum fyri einar 15 milliardir krónur. Ein av hesum milliardunum fer til Brugdan 2 brunnin á føroyska landgrunninum.

